


# Nú taka norðmenn Jan Mayen við í oljumetingarnar

**Jan Müller**

17.03.2014 - 10:28

Oljan.fo

Fyri fyrstu ferð hava norsku oljumyndugleikarnir tikið Jan Mayen við í almennu metingina um landsins komandi oljuleiðir.

Tann nýggja metingin er knappar 600 milliónir rúmmetrar størri enn tann seinasta, og 60 prosent av vøkstrinum stava frá landssynningspartinum av Barentshavinum og Jan Mayen-leiðini.

Tann vanliga uppfatanin er, at teir norsku oljumyndugleikarnir eru rættiliga varnir, tá teir skulu meta um tilfeingið í norskum øki. At myndugleikarnir nú taka Jan Mayen-økið við í metingina vísir, at serfrøðingarnir hjá myndugleikunum eru komnir til ta niðurstøðu, at grundarlag er fyri at vænta munandi olju og gass haðani.

Metingin hjá norsku myndugleikunum er, at 90 milliónir rúmmetrar kunnu fáast úr norska partinum av Jan Mayen-leiðini. Hetta er munandi minni enn fyrr mett, tí onkur meting hevur ljóðað upp á heilar 640 milliónir rúmmetrar ella einar fýra milliardir tunnur av olju.

Ísland eigur part av Jan Mayen-leiðini, tann sokallaða Drekaleiðin, men íslendsku myndugleikarnir hava ongantíð kunngjørt, hvussu nógv kolvetni man vera í íslendskum øki. Tann einasta tøka metingin er tann, sum koma frá felagnum Eykon í fjør. Tá metti felagið, at einar seks milliardir tunnur av olju eru í tí íslendska økinum við Jan Mayen.